Nýtt føroyskt kórverk í Fríðrikskirkjuni

Sunnukvøldið komandi verður nýggja rútmiska kórverkið hjá Jóhan Mortensen "Jólaboðskapurin" frumframført í Fríðrikskirkjuni á Toftum

KÓRKONSERT
Tíðindaskriv

Konsertin verður rættiliga fjølbroytt. Skúlakórið í framhaldsdeildini í Runavík fer at leggja fyri við sínari skrá. Í hesum kórinum, sum nú hevur nøkur ár á baki, eru í ár einir 30-35 sangarar – bæði gentur og dreingir. Nakrir av sangarunum,ið sungu við í fjør, men nú eru farnir úr skúlanum, fara eisini at syngja við. Eitt stórt gentukór, mannað við einum 60 - 70 gentum úr skúlunum á Glyvrum og í Runavík, fer at framføra yndisliga "Ave verum" hjá Mozart. Aftan á tey fer Manskórið á Skálafjørðinum at syngja nakrar sangir. Manskórið hevur øll hesi síðstu árini sungið til jólakonsert í Fríðrikskirkjuni og á tann hátt sett sín serstaka dám á tíðina undan jólum.

Eftir eina stutta andakt verður nýggja jólakórverkið hjá Jóhan Mortensen "Jólaboðskapurin" framført. Verkið, sum er eitt sindur meira rútmiskt enn tey undanfarnu, er í fimm satsum. Teksturin í verkinum verður prentaður á baksíðuna á konsertskránni. Eitt stórt blandað kór við einum 60 - 70 sangarum fer at leggja fyri. Tey eru við í fyrsta, øðrum, triðja og fimta satsi. Í øðrum satsi fer Marita Joensen eisini at syngja solo. Í fjórða satsi, tá einglarnir syngja fyri hirðunum úti á markini, fer gentukórið í skúlanum á Glyvrum mannað við einum 40 - 50 gentum at syngja. Endasatsurin er ein halleluja-satsur.

Sum vant verður fylgispælstónleikur aftur við kórsanginum. Kórið fer kortini at syngja við síni egnu styrki - uttan mikrofonir. Teir fýra,ið manna fylgispælsbólkin, eru kendir og royndir tónleikarar her á landi. Í onkrum pørtum verða floytur eisini at hoyra.

Konsertin verður í Fríðrikskirkjuni sunnukvøldið klokkan 20:30

Sunnukvøldið verður nýggja rútmiska kórverkið hjá Jóhan Mortensen, Jólaboðskapurin, frumframført í Fríðrikskirkjuni á Toftum

Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum, sum mintust meg
á 70 ára degnum.
Ein serlig tøkk til børn og svigarbørn við familju.

Heilsan
Jona Gudmundsen
Sandavági

Lærlingur
til handilin í Miðvági

Um starvið:
Læran umfatar allar tættir í rakstri av einum nútímans handli við denti á vørukunnleika og kundatænastu.

Lærutíðin er 2 ár og 18 vikur fyri umsøkjarar við HF og studentprógvi; handilsfakini skulu takast fyrsta árið á dag- og kvøldskúla. Hevur umsøkjarin HH er lærutíðin 2 ár, og 3 ár um umsøkjarin hevur FHS. Ástaðiligi parturin í sambandi við vørukunnleika er á skúla í Danmark í samanlagt 8 vikur.

Lønin er sambært sáttmála millum Figgjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Um lærlingin:
Lærlingurin skal hava hug til at nema sær kunnleika innan økið ið rúsdrekkasølan virkar á, verða fyrikomandi, álítandi og hava góð samstarvsevni.

Tey ið søkja starvið, skulu hava FHS, HH, HF ella studentprógv.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Dagmar S. Joensen

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 17.

Rúsdrekkasøla Landsins
Hoyvíksvegur 51
Tórshavn
Tel 31 42 77

Uppgávan hjá Rúsdrekkasølu Landsins er at innflytta og selja rúsdrekka í Føroyum. Stórnurin eigur í so stórum mun sum gjørligt at verða eikin út frá handilslígum sjónarmiðum, tó við nøvnugum atlit at heilsulígu sjónarmiðum, sum eru ásett í endamálsgreinini í rúsdrekkalógini.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur sølubúð á Dreymi, í Skála-vík, Miðvági, Hava, Saltang-rá og í Klaksvík umframt postsendiarmu. Harafturat er rúsdrekkasølan vørudivegari

Rúsdrekkasøla Landsins
Hoyvíksvegur 51 Postboks 3069 FO-110 Tórshavn
Tel (+298) 31 42 77 Fax (+298) 31 22 60

Eiðis kirkja 120 ár 18. september

Kjartan Stakksund hevur yrkt henda sang í sambandi við at Eiðis kirkja aftur varð tikin í nýtslu 1. sunnudag í advent, eftir at hon er umvæld

Tøkk, Gud fyri kirkju tína,
bygd á hesum vakra stað;
vit nú aftur vilja trína
inn um kirkjugátt í dag;
lat nú orð títt til oss ljóða
við tess kraft og halgu ond,
tú oss higar hevur bjóðað,
rætt oss hevur kærleiks hond.

Kirkju tína her á Eiði
fegnast vit í stórum um,
orð títt okkum vegin greiði,
náðar evangelium,
hevur ljóðað her í øldir,
prædika og sálmasong,
sungið hava mannafjøldir,
gjøgnum árini so mong.

Lov og tøkk vit Gudi siga,
fyri skírn og altarborð;
og vit vilja øll her biðja
teg at signa halga orð,
tað sum ber oss boð um náði,
undurfull og dýrabar,
prís og tøkk Gud faðir fái,
sum her niður til oss sær.

Signa Gud nú hendan dagin,
nú vit aftur savnast her;
hoyra um hin halga staðin,
sum tú oss til reiðar ger.
Gev at orð títt greitt her ljóðar
til hvønn syndabundnan træl;
at tú Gud oss øllum bjóðar
inn í halga himnasal.

Fedrarnir her hava funnið
troyst, og sælan hjartafrið,
tí at Jesus hevur vunnið
teimum fyrigeving, grið;
eisini vit honum prísa,
fyri hansar sáttargerð
og at hann vil okkum hýsa,
har sum hann jú sjálvur er.

Kirkjuklokkan okkum kallar
her til halgan náðifund;
Gud, tú sónar syndir allar,
gevur frið í sál og lund;
einaferð er skeiðið runnið,
foldarlívið liðugt er,
hevur tú tá Jesus funnið?
So tað móti himni ber.

Bókadeild Føroya Lærarafelags:

Bøkur til øll

Frá v. niðast Andrias Hammer, Brynhild Andreassen, Liss J. Hansen og Elin Mortensen. Frá v. ovast Astrid Mac Donald og Kristina Tausen,ið hava myndaprýtt bøkurnar um Kuffa og leikurnar

Mynd: Jens Kr. Vang

Nú hevur Bókadeild Føroya Lærarafelags aftur sent tríggjar bøkur til prentingar. Og nú eru bøkurnar liðugt prentaðar og klárar at geva út. Ikki bert bøkur eru á skránni hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags hesuferð - eisini eitt føroyskt telduforrit til børn er komið út á marknaðin

ÚTGÁVUR
Ingrid Bjarnastein

– Hetta er eitt serstakt høvið, sigur Niels Jákup Thomsen, leiðari á Bókadeild Føroya Lærarafelags.

– Bókadeild Føroya Lærarafelgs gevur út nógvar bøkur um árið, men hesuferð er talan um bøkur, sum allar eru uppruna føroyskar.

Barnabøkurnar eru tvær og eisini er ein endurminning.

Bókin Leiku liva – tá ongin sær kann kallast ein føroysk útgáva av Walt Disney filminum Toy Story. Hetta er fyrsta av tveimum bókum, sum ætlananin er at geva út, og kemur onnur bókin helst út til várs. Liss J. Hansen hevur skrivað bókina. Leikur gera alt møguligt tá ongin sær, og er tað hetta, sum bókin snýr seg um. Tá menniskju eru tilstaðar liggja tær deyðar, sum leikur jú eiga at gera. Leikurnar byggja luftkastellur, liva av sólstrálum og drekka hvørvisaft. Torkil, sum er nevndur í bókini, er sonur Liss. Søgan Leikur liva – tá ongin sær er bygd á søgur, sum hon hevur fortalt Torkil tá hann var yngri. Eisini hevur Torkil tveir stórar beiggjar og hava teir eisini fingið pláss í bókini

Kuffertfiskurin

Bókina hevur Brynhild Andreassen skrivað. Hon er um 2 kuffertfiskar, sum sjálvandi liva í sjónum. Kuffi, sum vanliga svimur runt í Suðurhøvum, verður sendur á ferð til Føroyar, í tí sambandi, at hann skal bjarga kuffertfiskaættini. Í Føroyum møtir Kuffi Havlisu...

– Eg havi einaferð fyrr týtt eina norska bók til føroyskt, sigur Astrid Andressen, rithøvundurin.

– Tá fann eg útav, at tað var minst líka nógv arbeiði at týða eina bók sum at skriva eina. Og eisini tá tú skrivar eina bók, noyðist tú at vera trúgvur ímóti tekstinum. Ikki ber til at sita og finna uppá ymiskt, um tú heldur okkurt manglar.

Handritið um Kuffa og hini hevur ligið í eini skuffu í langa tíð. Tá bókin upprunaliga skuldi koma út fyri nøkrum árum síðani, fekk Astrid kaldar føtur, men nú er bókin útgivin, og er hon ein annaðleiðis og spennandi barnabók.

Elin Mortensen hevur skrivað endurminningar um heimbygdina Tvøroyri. Barnabókarithøvundirnir geva teirra fyrstu bók út, meðan hetta er 5. bókin Elin Mortensen gevur út. Nógvar gamlar myndir prýða bókina, sum lýsir tíðina tá Elin var ung.

Men er tað ikki ringt at minnast so langt aftur í tíðina?

– Nei, tað er tað ikki, sigur Elin Mortensen.

– Nærum øll familjan hevur eitt gott minni, og fyrr varð tosað nógv við børn. Mamma plagdi at fortelja søgur og tú hevði ikki so nógv rundan um teg tá, sum órógvaði.

Teldutøkningur og bókstavir

Teldutøkningurin Andrias Hammer hevur gjørt eitt telduforrit til børn undir skúlaaldri. Hetta er ein fløga, ið skal læra barnið bókstavirnar við hjálp av orðum, myndi, teksti, spæli og filmum.

Fløgan inniheldur 29 bókstavsfilmir, 29 spøl, 29 myndir og nakrir smærri filmar eru eisini við.

Hetta er vælegnað at brúka í barnagarðinum, heima ella á forskúla. Eisini kann tað verða ein hjálp, um barnið hevur ringt við at læra seg bókstavirnar.

Barnabøkurnar hevur Spf. Hestprent umbrotið og prentað, meðan Einars Prent hevur umbrotið og prentað endurminningarnar av Tvøroyri. Allar bøkurnar og fløgan fáast nú til keyps kring landið.